Fer Europa at reisa seg?

Hugleiðingar um tað nýggja Europa, um týskt mál og týskar bókmentir og um meginlandsins leiklut yvir av heiminum og USA

DUPULTKRONIKK
eftir Hanus Kamban

Men nóg mikið fyri fyrst um Týskland, Europa og USA, eg leggi Todd og aðrar frøðingar til víks, ti vit mugu víðari. Eftir eina stutta vitjan á borgini Wartburg, tætt við Eisenach, har Luther veturin 1521-22 sat og umsetti Nýggja Testamenti til týskt (tað var á hesum sinni hann, um eg ikki minnist skeivt, grýtti eitt blekkglas eftir hinum grábeinta), við teirra avleiðing, at átrúnin í Norðureuropa varð endurskaptur í paulinskum líki - so at náðin, ikki gerðin, eftir hetta veitti frelsu - aka vit víðari, fyrst við kós móti Gera, og síðani eftir motorvegnum suður ímóti Regensburg.

Móti kvøldi koma vit til bygdina Schwandorf, har tað eydnast okkum at fáa innivist, bíliga og í eini rúmligari og ljósari stovu, í tí niðurlagda bóndagarðinum Egidienhof, og morgunin eftir koyra vit tann stutta teinin til Regensburg.

Ein dámur av mentan, lættleika og suðurlendskum ljósi hvílir yvir hesum gamla, rómverska býi. Okkara steðgur er ikki langur, men tað lukkast okkum at síggja dómkirkjuna Dom St. Peter, sum í stórbærum vakurleika minnir um hana í Canterbury, ein ferðaleiðari, sum er kønur í byggilist og gudfrøði, vísir okkum runt, hann peikar á púkar og enntá á sjálva ommu hin grábeinta, sum miðaldar byggimeistarar hava avmyndað, kleimda niðri undir eini tjúkkari súlu, her er tað heldur gerðin enn náðin, ið verður brúkt til at binda Mótmannin Mikla niður.

Seinni ganga vit oman at áarbakkanum, har kemur Donau brúsandi undan teirri undurvøkru Steinerne Brücke (sum varð bygd árini 1135-46), ikki blá her, men brún, einum rennur í huga Claudio Magris og hansara essayskaldsøga *Donau*, og ein brellast eftir onkuntíð at fara tann langa súkklutúrin oman við ánni, frá hennara keldu í Schwarzwald til ósan við Svartahavið, ella kanska, sum júkagarpar á sinni, við skipi, um ikki í líka mótræsnum sjógvi sum teir:

Vaksa tók tá veður,
byrur lá av londum,
sundur gingu jarnárar
báðar í Høgna hondum.

Sum fyri ikki at kasta aftur matkynstrið á staðnum keypa vit ein rothenburgara (sum pylsan her á staðnum eitur), og *Sauerkraut* afturvið, og meðan vit fáa okkum, uttan fyri ta aldargomlu Wurstküche, sum í 12. øld mettaði teir arbeiðsmenn, sum bygdu grótbrúnna, kemur lítillátin maður, sjúkur, men tó lýsandi av anda og av sjónum, sum tykjast glógva undan høgum, dýrdmiklum kirkjuhválvi, og biður góðan dag.

Í benadiktinarakleystrinum í Melk er funnið kanska tað elsta handritið við reglum úr Nibelungenlied

Stephansdom í lýsingini, sædd úr erva

Mær rennur í huga, at stutt hiðani endaði Johannes Kepler, um tað mundi í tænastu sum støddfrøðingur hjá Wallenstein greiva, sínar dagar í november í árinum 1630. Kepler, flogvit og ein tann fyrsti empirikarin í vísindum, orðaði tær tríggjar keplersku lógirnar, um gongustjørnurnar, sniðið og ferðina á teirra rásum, skrivaði *Somnium*, ein tann fyrsta vísindaskaldskapartekstin, eins og hann sum tann fyrsti vísti á ta alisfrøðiligu megi í alheiminum, sum Newton seinni rópti gravitatión. Ikki minni merkisvert er, at hann megnaði at bjarga móður síni, ið var løgd undir at vera gandakelling, undan deyðanum. Hesin lýsandi andi orðaði sjálvur sína gravskrift, ið ljóðar soleiðis:

MENSUS ERAM COELOS
NUNC TERRAE METIOR
UMBRAS
MENS COELESTIS ERAT
CORPORIS UMBRA JACET

(Himmalin máldi eg, nú máli eg jarðar skuggar / andin reis móti himli, likamsins skuggi søkkur)

Dagin eftir koyra vit úr Regensburg, í ein landsynning ískaldan og fyri Passau, her er áhaldandi undanbrekka, sum vit koyra umskarast Donau og motorvegurin fleiri ferðir, so vit fáa hvørji til at aka yvir um brúgvar við bergtakandi útsýni, langt burturi síggjast skýggj reka yvir tindum og skógum, eg havi eina kenslu av at hava verið her fyrr, og tað er mær brádliga greitt, at tað er í Ringanna Harra eg havi sæð hetta landslagið, á hesum leiðum búleikaðu, hugsi eg, Artala kongur og Júkagarpar, undir okkum streymar áin Anduin, og á flotunum uttast í sjónarringinum kundi ein, um eyguni vóru góð, kanska hómað Aragorn og Róhans reiðmenn.

Vit steðga stutt í Passau, strúka so víðari eystur móti Linz, koyra gjøgnum býin og finna eitt gistingarhús nakað uppi í fjøllunum í bygdini Gallneukirchen, hjá einum Harra Wolfsjäger, hvørs kona er donsk og framúr blíð og fyrikomandi.

Dagin eftir halda vit leiðina móti Wien, her hækkar lendið, so vit kunnu eygleiða Donau, sum streymar niðri í dalinum eitt sindur norðan fyri okkum. Vit koyra fram við Amstetten og síggja nakað seinni tað stóra, prýðiliga kleystrið Melk, upprunaliga úr miðøld, men umvaksið og endurbygt í 18. øld í barokkstíli, kent úr skaldsøguni *Rósunnar navn* eftir Umberto Eco. Her varð fyri o.u. einum ári síðani eitt handrit funnið, sum summir granskarar halda vera tað elsta handritið, við brotum úr *Nibelungenlied*.

Vit fáa seinni høvi til at vitja tað stórfingna kleystrið og síggja handritið, og annars sigla einar tveir tímar eftir Donau, til bygdina Dürnstein, har vit nakað uppi í fjøllunum síggja toftirnar av teirri borg, har tann (stak ódugnaligi) enski kongurin Rikardur Leyvuhjarta, á heimferð frá teirri triðju krossferðini, sat fangi eitt skifti árini 1192-93.

Tá ið vit nærkast Wien, er farið at kvølda, vit koyra strekki eftir strekki, her tykist alt ovurstórt og villingarsamt, men tað lukkast okkum at finna Ringin, nakað seinni koma vit til Hotel Post í Fleischmarkt, har vit skulu gista.

Wien er, sagt við fáum orðum, eitt yvirflóðarhorn av slottum, listaskálum, konserthøllum, kaffistovum og bókhandlum. Sum vera man gongur leiðin, tá vit morgunin eftir, ein sunnumorgun, fara at skimast í býnum, fyrst til Stephansdom, ta gomlu gotisku dómkirkjuna. Seinni sama dag reika vit eystur um Donau, til Prater, har ein í tí ovurstóra parisarahjólinum, haðani slott og kirkjuspír skyggja undir einum í sólini, minnist Harry Lime, úr skaldsøguni *Tí triðja Manninum* eftir Graham Greene og filminum við sama heiti eftir Orson Welles, og hansara í so banalu yvirmenniskjaheimspeki, ið sjálvsagt stavar frá Nietzsche og *Raskolnikov* eftir Dostojevskij.

Í Wien sæst annars farvegur eftir eina ørgrynni av skaldum, vísindamonnum og listafólkum, teirra millum Wittgenstein og Schnitzler, Klimt og Hundertwasser. Hvat úrvali og støði viðvíkir minnir staðurin meira um París enn um Keypmannahavn, ein sannroynd, ið sjálvsagt kann førast aftur til, at hann fyri øld síðani var høvuðsstaður í einum ríki við o.u. 54 milliónum av íbúgvum. Sorgin um missin, tað traumatiska bakkastið frá bardaganum 1914-18, tykist seyra úr galvum og breytum, og navnið á Gavrilo Princip, manninum sum festi í neistan, anir ófráttakent undir hugans væðing.

Í mínum huga er tað tó ein annar maður, sum í heilum ger vart við seg. Í miðjum desember 1947 flýddi rumenski yrkjarin Paul Celan úr heimlandi sínum til Wien, tí undir tí trongu, veingjaskerdu lonini í kommunistiskum londum var ikki pláss fyri hansara surrealismu. Hansara steðgur sæst speglaður aftur í krimiskaldsøguni *Internationale Zone* eftir Reinhard Federmann og Milo Dor, frá 1953.

Tað eydnast mær at finna aðra av hansara adressum, Rathausstraße 20, beint við lærda háskúlan í Wien. Og her stendur ein so og hugsar um henda gávaða orðsnillingin, hvørs merkisverdi musikalitetur ikki vildi sleppa honum, hóast hann megnaði at skapa eitt nýtt mál og gera lopið frá vøkrum skaldskapi til "gráan poesi", og hvørs lýriski

Johannes Kepler (1571–1630) var slóðbrótari í empiriskum vísindum

heimur fatar um sár, utopi og negativa gudfrøði, eina ákallan á eitt "tú", sum bæði er Eingin og eingin:

O einer, o keiner, o niemand,
o du:
Wohin gings, da´s nirgendhin
ging?
O du gräbst und ich grab, und
ich grab mich dir zu,
und am Finger erwacht uns der
Ring.

Tann jødiski-rumenski yrkjarin, sum misti síni foreldur í kzlegum undir 2. heimsbardaga, og sum druknaði seg í ánni Seine í 1970, særdur kanska av hugtyngslu um at hava livað Die *Endlösung* av, men ivaleyst líka so nógv av órættvísum plagiatskuldsetingum, er í dag tað gitnasta navnið í týskum skaldskapi, eitt navn, ið ikki stendur aftan fyri nøvn sum Rilke, Kafka og Mann. Kann hetta, umframt at spegla aftur dýpdina og flogið í hansara yrkingum, samstundis takast sum tekin um, at týsk mentan hevur livað Saurons øld av, og at ein tíð er komin, tá sangir aftur kunnu syngjast *hesumegin* mannaættina?

Aftur komi eg at hugsa um Emmanuel Todd, sum seinast í síni analýsu sær fyri sær eitt "emansiperað" Europa, ein heimspart, sum ristir av sær sína undirbrotligu "sjálvkolonialisering" og ásannar, at hansara mentan er fjølbroyttari, ríkari og eldri enn tann amerikanska, og at hann, hvat sosialari umsorgan og sonnum fólkarædi - møguleikum hjá høgum sum lágum at fóta sær ella koma sær fram - viðvíkir, er komin mílir longur enn USA.

Eg komi at hugsa um bókina *More Equal Than Others* eftir enska blaðmannin Godfrey Hodgson, har ført verður fram, at árini 1981 til 1993 fall reallønin hjá amerikonskum løntakarum við 5 prosentum, samstundis sum lønin hjá teimum 5 prosentunum á ovastu rók hækkaði við 30 prosentum. Kanska kundi eitt endurreist Europa blivið eitt fyriðømi, eisini fyri meginríkið handan havið, sum av tí kundi lært um umhvørvisvernd og fólkarædi og etikk, eins og tann framkomna norðureuropeiska sosiala skipanin kundi hjálpt USA at blakað av sær arvin frá Reagan og Bush, ta ónýtiligu nýliberalu triumfalismuna, og leitað uppaftur sína egnu fortíð: landið við møguleikum fyri øll, sum Tocqueville lýsti í 1830-unum.

Nú tað snýr seg um lond og um umdømi teirra, rennur mær í huga, at Eysturríki ofta sæst fáa ringt skoðsmál, eitt nú í seinasta nummari av blaðnum Die Zeit, har tað verður umrøtt sum smáborgarligt, uppgjørt og samstundis eyðkent av afturhaldi og býttisligari nostalgi. Nakað kann vera um hetta. Hinvegin hevur landið megnað at varðveita ein stóran part av síni upprunaligu skógarvídd, og einum rennur í huga, at tess stjórn, við kanslarum sum Bruno Kreisky á odda, eftir 2. heimsbardaga hevur framt tiltøk til fyrimunar fyri tær lægru stættirnar.

Sjón gongur fyri søgn, tá vit eitt kvøldið koma á plássið framman fyri Neues Rathaus. Her ber til at sessast í summarlýkkuni framman fyri einum risastórum skermi, har ein kann síggja og hoyra tónaverk framførd av mætum musikarum og dirigentum, verk eftir Mozart, Wagner og Verdi - alt fyri einki - og í einum festligum umhvørvi við alskyns vín- øl- og ábítsbúðum, tysjandi mannamúgvum, látri, práti, teskan og fríggjan. Vit taka við tí, sum vikan hevur at bjóða, og tað eydnast okkum at síggja og hoyra m.a. *La clemenza di Tito* eftir Mozart og *Nabucco* eftir Verdi. Eftir slík kvøld spákar ein heim í skýmingini við veingjaðari sál.

Tann 9. august sessast vit aftur í okkara silvurgráa Peugeot 307, sum - nú ómóður, til dystin fús, næstan algoystur - ber okkum norðureftir aftur við kós móti Berlin. Her kann til seinast verða nevnt, at vit í Wien hava tikið lut í teirri 25. ráðstevnuni hjá IASS (International Association for Scandinavian Studies). Men umrøða av hesi ógvuliga áhugaverdu stevnu fellur uttan fyri mín setning á hesum sinni.

Dagin fyri fráferðina siti eg í sólini á Café Central, og aftur rennur Christian Haraldsen fram fyri, við veikari glæmu um andlitið, og, spyrji eg meg sjálvan, hvat hevði hann svarað, um eg spurdi hann: Hvat er hjartað, sjálvur essensurin, í málinum hjá Walther von der Vogelweide, Rilke og Thomas Mann? Eg veit ikki, hvat hann hevði svarað, og eg fái tað ongantíð at vita. Janus skald megnaði heldur ikki at svara upp á spurningin, og kortini skrivaði hann, tá hann lævt sína síðstu týðing, eftir Jakob Böhme, koma upp á prent, at tað var til minnis um "eina tíð, tá ið týskt tóktist eitt vakurt mál". Janus var mangan merkiliga beinrakin, og kanska peikaði hann við hesum fáu orðum fram ímóti einum endurburði fyri týskt mál og týska mentan, tí endurburði, sum Brandt, von Stauffenberg og Paul Celan umboða.

Sjálvur havi eg ta kenslu, at týskt, eins og (fyri ein part ið hvussu er) føroyskt, goymir í sær, við sínum konsonantiska súsi og sínum ríkidømi av eigiligum tvíljóðum, eina gátuføra atavismu, sum tíð og mentan hava ríkað og skúlað, eina andaborna kjølfestu, eg ikki vildi verið fyriuttan, eina lækju aftur í ævintýr og søgn, minnið um djúpan skóg og ævinliga heiði.

Wartburg, har Luther veturin 1521–22 umsetti Nýggja Testamenti til týskt